## Allan um átrúnað

Um tú spurdi meg fyri einum ári síðani, so hevði eg uttan iva sagt, at tað spældi ein lítlan leiklut í mínum lívi. Fólk síggja tað nokk ikki á mær. Men sannleikin er, at Jesus fyllir nógv í mínum lívi í dag



## ... um Føroyar sum eitt valdømi

Politikkur hevur sum so ikki mín áhuga, hatta havi eg onga støðu til. Ella sagt við øðrum orðum: Tá tað kemur til politikk í Føroyum eri eg póllendingur (Allan er av pólskari ætt).

# So nær við, og tó so

**Ársins venjari í kvinnudeildini fegnast um, at hann gjørdist Ársins Venjari. Men hann iðrar seg um, at lið hansara bara var nakrar fáar minuttir frá at bróta FM-monopolið hjá KÍ-kvinnunum**



### Ítróttarprofilurin




**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo


Longu í sínum fyrsta ári, sum venjari í kvinnudeildini mundi Allan Dybczak farið allan vegin við liði sínum, B36. Liðið misti Eyðfríð Kristiansen longu í næsta dystinum í kappingarárinum. Hesin dysturin var ímóti NSÍ, sum seinni tók liðið úr kappingini. Men júst nakrir av bestu leikarunum hjá NSÍ leitaðu sær suður til Havnar at venja undir Allani. B36 fekk tilgongd av Heidi Sevdal, Heidi á Lakjuni og Sigrið Petersen. KÍ í sínum lagi fekk tilgongd úr EB/Streymi og AB, har ávikavist Doris í Garði Joensen og Olga Kristina Hansen styrktu um liðið hjá Føroyameistarunum. Hesi væl mannaðu liðini fylgdust til dyrnar, har málmunurin gjørdist einasti munurin, tá saman um kom. Og í endaliga roknskapinum máttu Allan og B36-kvinnurnar lúta. B36 hevði annars gullið í pottinum, í seinasta útidystinum ímóti KÍ. Tær løgdu seg á odda 2-0, og Allan helt sjálvur, at nú var tað heima! Men nei, Rannvá Andreassen skoraði til 2-1. Og júst tá Allan fer at kanna eftir hvussu dóttirin Ragnhild hevur tað í barnavogninum, hoyrir hann rómin frá KÍ-áskoðarunum. "Tað løtuna var gott at hava Ragnhild" sigur Allan sorgblíður. Ragnhild, sum fyllir 2 í desember eigur stórt rúm í lívinum hjá 33 ára gamla havnarmanninum. Hon hevur eisini verið ein maskottur hjá liðnum, og hevur verið við til nógvar dystir. Allan funderar: "KÍ skoraði ikki ímóti okkum í Gundadali. Vit skoraðu 3 ferðir ímóti teimum í Klaksvík. Og kortini gerast tær Føroyameistarar." Jú hetta er beiskt at svølgja hjá nærlagda venjaranum. "Høvdu tær ikki havt Rannvá, høvdu vit definitivt vunnið FM!" undirstrikar Allan avgjørdur. Allan er tó fullvísur í, at fer Randi Wardum at standa í málinum hjá íslendsku meistarunum; Vali í 2008, so fer KÍ at missa fleiri stig, og møguleikin at bróta FM-monopolið er avgjørt til staðar tá.

### Misti mammuna á ungum árum

Familjan hjá Allani er upprunaliga ein HB-familja. Mammubeiggjin Magni Dybczaj spældi í sínari tíð á besta liðnum hjá HB. 5 ára gamal fór Allan at venja við HB. Men har var hann bert í eina viku. Vinmennirnir spældu allir við B36, og Allan vildi verða har teir vóru. Allan spældi við B36 inntil 15 ára aldur, tá mamma hansara Maria gjørdist sjúk av krabbameini. Stutt eftir doyði mamman, og gjørdist hetta ein tung og døpur tíð hjá Allani og yngru systruni, sum bara var 4 ár. Allan kom ongantíð veruliga í gongd aftur at spæla fótbólt. Tá fótbóltur var á skránni, fyrstu árini eftir hetta, var tað bara hugnafótbóltur.